FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

Stjórnarskrivstovan
26. mai 2020
Mál: 20/00220-4
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 87/2019

Svar til § 52a fyrispurning nr. 87/2019 frá Brandi Sandoy, løgtingsmanni

Fyrispurningur um útgjaldið til fiskimenn úr Trygdargrunninum, settur landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard (at svara skrivliga eftir TS § 52a).

1. Er tað soleiðis, at minstaløn til fiskimenn, sum fiska á ytru leið, bara er 1/3 av 1100 kr/dag?

2. Hvørjar grundgevingar hevur Trygdargrunnurin fyri at gera hendan stóra munin á fiskimonnum, sum fiska á innaru og ytru leið?

3. Eru ætlanir um at hækka útgjaldið til fiskimenn, sum fiska á ytru leið?

Svar:

Til spurning 1.
Nei, tað er ikki so, at minstaløn til fiskimenn, sum fiska á ytru leið, bara er 1/3 av 1.100 krónum pr. dag.

Sambært § 2, stk. 1 í kunngerð nr. 164 frá 20. desember 2017 um inntøkutrygd er minstaløn kr. 1.100 um dagin. Ongar serligar reglur eru fyri fiskiskap á ytru leið.

Minstaløn verður veitt fyri tað talið av døgum, skipið er til fiskiskap. Dagatalið verður roknað frá tí degi, farið verður til fiskiskap og til tann dagin, komið verður aftur av fiskiskapi.

Dagatalið verður gjørt upp eftir skrásetingum hjá Vørn, sum staðfesta, nær túrur byrjar, og nær túrur endar.

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Hesar upplýsingar, Trygdargrunnurin fær frá Vørn, verða samanbornar við avrokningar frá reiðarínum. Um avrokning frá reiðarínum hevur færri dagar, enn tað, sum er skrásett hjá Vørn, verður dagatalið lækkað samsvarandi.

Til spurning 2.
Tað er eingin munur á minstuløthings hjá fiskimonnum, sum royna á innaru leið og teimum, sum royna á ytru leið. Kunngerðin um inntøkutrygd skilir ikki ímillum fiskiskap og innaru og ytru leið.

Til spurning 3.
Tað er vanliga stýrið fyri Trygdargrunnin, sum heitir á landsstýrismannin at gera broytingar í galdandi lóggávu og reglum, og fyrisitingin hjá Trygdargrunninum er ikki vitandi um ætlanir at hækka útgjaldið til fiskifólk, sum fiska á ytru leið.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður